# Fólkafundur uppi á Skarði

**Sunnudagin 5. aug., helt Fuglafjarðar Fornminnisfelag sín árliga fólkafund uppi á Skarði millum Fuglafjørð og Hellurnar. Sum undanfarin ár var væl av fólki møtt upp – eini 200 varð mett. Fjallarøðuna í ár helt Sólbjørn Jacobsen, har hann hugleiddi um Gjógvarágarð í farnum døgum**



*Poula – gift við Hákun Poulsen*
*Mortan á Geilini*
*Sverri Dahl*
*Andreas í Tøvuni*
*Georg hjá Sámal í Lambanum*
*Hákun Poulsen*
*Víkingaútgrevsturin niðri við Gjógvará í Fuglafirði.*
*Sólbjørn Jacobsen tók myndina*

Hetta er fyrstu ferð at eg eri við til fólkafund her á Skarðinum. Sum eg skilji er siðurin at fáa fuglfirðingar at hugleiða um farnar tíðir. Tað er ólíka léttari enn at hugleiða um nútíðina har øll kunnu vera við og hava sína serstøðu.

Míni fyrstu minni um Skarðið eru, tá ið vit sum smádreingir fóru úr Gjógvarátúni at fiska síl í Laxá og hyggja at ternunum í Blotanum. Skarðið bant eisini býlingin Gjógvará við Hellurnar, tí haðani var Sjúrður ættaður. Helst er tað ikki uttan grund at fyrsta mannagøta um Skarðið hevði heiti Sjúrðagøta.

Tað er meira enn fimti ár síðan eg flutti heimanífrá – úr Fuglafirði, úr Gjógvarátúni. Míni fyrstu 14 ár, áðrenn eg fór heimanifrá eru sum vera man tey mest avgerandi í lívinum, tí eg føli meg framvegis sum fuglfirðing. Barnaárini eru støðið fyri lívið.

Barnaárini við Gjógvará við teim umhvørvis umstøðum og teim menniskjum har búleikaðust minnist eg sum nakað gott og brynjandi.

Áin sjálv var ein týðandi táttur øll barnaárini. Myrku illveðurskvøldini við áarføri kundi kenslan vera hóttandi, men tá ið ein kreyp undir flógvu dýnina kendist dunandi Gjógvará meira sum ein hugni, ið bar ein inn í tryggan svøvn.

Teir gomlu á garðinum, sum altíð vóru har og spákaðu í túninum og altíð høvdu tíð til eitt prát vóru Mortan á Geilini, Líggjas við Gjógvará, Sjúrður og Kalurin ella Poul Jacob.

Var veðrið ófýsið savnaðust menn oftast á bátaloftinum hjá Vestmanna-Jóannes. Um vit piltar tagdu og sótu stillir kundu vit viðhvørt sleppa við og lýða á meðan prátið gekk undir stormlyktini og ælini buldraðu á zinktekjuna. Niðri undir var smiðjan við gomlu essuni har Dánjal Jákup á Viðareiði smíðaði sínar tiltiknu knívar og onkuntíð líggjar.

Var ein heppin, so var tað spennandi at hála í bjølgin og síggja hvussu stálið skifti lit í essuni og hvussu Dánjal Jákup evnaði tað til á amboltinum.

Um hesar gomlu eru nógvar søgur og fleiri munna vera, sum eru burtur saman við teimum.

Millum hetta ættarliðið og okkum børn vóru foreldrini. Seinastu fjórðingsøld eru flestu farin og vit sum einaferð vóru børn, hava nú sólina í vestri.

Men umhvørvið við Gjógvará, í túninum og á sandinum var ein eydnuverð fyri okkum. Frá tí eg minnist fór eg at fiska síl í Gjógvará.

Tann dag í dag kundi eg næstan við bind fyri eygunum funnið fótafesti frá ósanum og niðan til Bládýpið, so ofta hava føturnar vant seg til leiðina.

Partur av barnaárinum var krígglð. Tapini og sorgarleikirnir á sjónum eru væl lýstir í ritum, bókum og samrøðum. Vit børn mundu ikki altíð gáa so nógv um tann óhugna sum kundi valda, tá ið einki var at frætta frá teim siglandi. Men mammurnar og tey eldru á landi bóru ofta tungar byrðar, tá ið óvissan valdaði.

Pápin sigldi øll krígsárini við Boðasteini. – Lat meg í hesum sambandi nevna tvær hendingar:

Fyrra er ein illveðursnátt á vetri. Eg verði vaktur av blonkum ljósi. – í kamarinum stendur pápi í oljuklæðum við vakrari reyðari amerikanskari lummalykt við sterkum ljósi. Hann kysti meg, gav mær lummalyktina, sum var dýrgripur í barnaeygum. Hetta er eingin hvørvisjón, men veruleiki. Hann segði frá, at teir tóku nakað av ísi, tí skipið var fult (107 tons) undir lúkuna av feskfiski úr Íslandi. Teir máttu sigla áðrenn tað varð ljóst, tí annars vóru teir noyddir til Havnar eftir nýggjum siglingarloyvi frá bretska hervaldinum.

Hin frásøgnin er frá ferð í Íslandi fyri 12 árum síðan. Saman við vinmanni ferðaðist eg í tjaldi runt Eysturlandið. Ein morgun vit komu koyrandi frá norðan komu vit framvið kirkjuna á Bakkafirði. Har stóð maður, ið var próstur fyri Eysturlandið. Sum ungur prestur var hann komin har í 1942. Hann var blíður, vísti okkum kirkjuna og bjóðaði morgundrekka og fór at siga frá sínum sambandi við føroyingar.

Hann fortaldi, at undir krígnum hendi tvær ferðir at manning við skipara bað um messu ella guðstænastu áðrenn teir skuldu sigla vandasjógv til Bretlands. Báðu ferðirnar var tað sama skipið við somu manning og skipara. Skipið var Boðasteinur og skiparin var pápi.

Knappliga stóð tíðin still og tað var andakt.

Einki er at ivast í at Fuglafjørður er gomul bygd. Prógvini eru fleiri. Uttan iva er býlingurin við Gjógvará eitt av elstu plássunum í bygdini. Sverre Dahl, sáli, skipaði fyri útgrevstri har síðst í fimtiárunum.

Í 7. bók av fróðskaparritinum hevur Sverri áhugaverda frágreiðing. Hann metir at elsti partur er frá víkingatíðini, um ár 1000 og at fólk hava búð har langt upp í miðøldina og kanska longur.

Føroya Landsstýrið hevur friðað økið sum fornminni.

Sverri er í síni frágreiðing sera keddur av at grevsturin mátti halda uppat av ymiskum orsøkum: pengatrot, – húsini hjá Trónda, sum nú eru burtur, vóru í vegin – toftirnar hildu áfram inn undir vegin og elsteyrar vóru í vegin. Neyðugt varð at steðga kanningunum og tyrva økið. Men økið er varðveitt. Harmuligt er, at tílíkur søguskattur er fjaldur undir oyruni.

Fuglafjørður er vinnulívsbygd burturav. Men sanniliga eisini ein mentunarbygd, ið skarar fram um nógv onnur pláss við sínum søguríka skipsfiskiskapi og útróðri. Nógv burðardygg vinna á landi við góðum og vælriknum virkjum.

Og við sínum ríka tónleikalívi, serliga sangkórini og góðu skúlarnar við teirra útbúgvingarmøguleikum og livandi ungdómi.

Eisini eru tiltøk framd at varðveita eldri hús.

Fyri tjúgu árum síðan skipaði bygdaráðið fyri, at húsini hjá Mortan á Geilini vóru umvæld í sínum upprunа sniði sum hús hjá útróðrar- og seyðamanni. Men við lítlari og ongari ogn.

Fyri stuttum var liðugt at flyta og umvæla Høvdahúsini, sum elstu sethús í bygdini.

Í huganum havi eg eina vón, sum helst ikki bert er ein dreymur. Vónin er at fuglfirðingar taka lógvatak saman við myndugleikum og vinnulívinum í bygdini og seta sær setningin, at hesi fornminni við Gjógvará enn einaferð verða kannað og tað til lítar, at hvør steinur og lutur verður vendur og kannaður undir leiðslu av okkara bestu fornfrøðingum, sum eg veit hava stóran áhuga fyri at fáa alt økið endurgrivið.

Tá ið hetta er gjørt eigur at verða skipað fyri at varðveita hetta fornfrøðisliga plássið opið í einum siðsøguligum umhvørvi sum okkara eftirkomarar kunna gleðast um og líta 1100 ár aftur í tíðina og gleðast um eina livandi framtíð.

Tí eins og nútíðin hvílir á herðunum hjá teim, ið farin eru, soleiðis verður framtíðin at hava søguna sum barlast og hvíla á herðunum á nútíðini.

Her eigur Fuglafjarðar Fornminnisfelag stóra tøkk uppiborið fyri at skapa ans og áhuga fyri hesum samfelag og umhvørvi, os komandi ættarlið hava djúpfestar røtur.

Hesum sigi eg tøkk fyri við ynskinum um góðan byrð í komandi tíðum.






Kjartan Hoydal:

# Løgmaður leypir á frælsið at skipa seg

**Kjartan Hoydal heldur, at løgmaður er lopin fram av, tá hann ávarar ímóti innihaldinum í einum brævi til limir í Átakinum Hesuferð, sum kom á skeivar hendur**

HESUFERÐ
*Eyðun Klakstein*

Kjartan Hoydal heldur lítið um ávaringina ímóti Átakinum Hesuferð, sum løgmaður sendi út til fjølmiðlarnar hósdagin.

– Við orðalagi, so kaldur gjóstur stendur frá, verður ávarað ímóti, at fólk samskipað eru ósamd við løgmanni og hansara sjónarmiðum um, hvussu farast skal fram í sjálvstýrismálinum.

– Hetta kann ikki fatast sum annað, enn at løgmaður leypir á frælsið at skipa seg og bera egin sjónarmið fram.

Soleiðis svarar Kjartan Hoydal skrivinum, sum løgmaður hósdagin sendi út um eitt teldubræv, sum Kjartan Hoydal skrivaði til limir í Átakinum Hesuferð, men sum kom á skeivar hendur.



*– Tað er óheppið, at løgmaður fer út við eini ávaring, sum er fullkomiliga óneyðug og sum byggir á so tunt grundarlag, sigur Kjartan Hoydal*

## Sendi til skeiv fólk

Tað var týsdagin, at Kjartan Hoydal, sum er eitt av oddafólkunum í Átakinum Hesuferð, skuldi senda teldubræv út til limir í átakinum.

Í hesum teldubrævi kom hann við tveimum uppskotum um, hvussu átakið skal arbeiða í heyst.

Annað uppskotið var at mótmæla arbeiðsháttinum hjá løgmanni, sum vil hava framhaldandi samráðingar við donsku stjórnina, og hin var at fáa fleiri viðmerkingar um sjálvstýrismálið í fjølmiðlarnar.

Trupulleikin var tó tann, at teldubrævið av misgáum varð sent nógv fleiri fólki, enn Kjartan Hoydal ætlaði. Onkursvegna kom brævið í hendur á løgmanni, sum beinanvegin reageraði ímóti brævinum.

Løgmaður kendi seg stoyttan av uppskotinum um at stríðast ímóti hansara samráðingum við danir. Anfinn Kallsberg sendi út eitt skriv, har hann kallaði innihaldið í brævinum fyri skipaðan ágang ímóti sær, og hann helt, at ætlaninar hjá Hesuferð kundu fara at forkoma sjálvstýristilgongdini.

## Lopin fram av

Kjartan Hoydal heldur, at løgmaður er lopin fram av við at senda bæði eina ávaring og sjálvt teldubrævið út til almenningin.

– Eg hevði skilt tað betur, um tað var formaðurin í Fólkaflokkinum, sum gjørdi hetta, men at tað skal verða løgmaður er óskiljandi. Tað er óheppið, at løgmaður fer út við eini ávaring, sum er fullkomiliga óneyðug og sum byggir á so tunt grundarlag, sigur Kjartan Hoydal.

– Fólk fáa við ávaringini hjá løgmanni eina fatan av, at her er talan um eina stóra og miðvísa kampanju ímóti løgmanni, men soleiðis er als ikki.

Kjartan Hoydal heldur, at brævið til limirnar í Hesuferð er einki øðrvísi enn tað, sum fer fram innan allar aðrar politiskar felagsskapir.

## Hava einki við Hesuferð at gera

Føroya mest umtalaða teldubræv í løtuni er sent fólki, sum hava tilknýti til Átakið Hesuferð, men tað er eisini av misgáum sent nógv fleiri fólkum.

Kjartan Hoydal heldur, at tað er skeivt av løgmanni at senda hetta teldubrævið út til almenningin við øllum móttakarunum á.

– Um eitt privat bræv av misgáum kemur øðrum í hendi enn tí, tað var ætlað, man vanligur fólkasiður var at bera sendaranum brævið aftur og boða frá mistakinum, heldur Kjartan Hoydal.

– Tað harmar meg nógv, at løgmaður sendir hetta brævið út, tí fleiri av móttakarunum av teldubrævunum hava fingið brævið av óvart og hava einki við Átakið Hesuferð at gera.

# Ein hjálpandi hond

**Kjartan Hoydal sigur, at Hesuferð hevur ongar ætlanir um at smoyggja sjónarmið niður yvir fólk, sum ikki vilja standa við tey**

LESARABRØV
*Eyðun Klakstein*

Í teldubrævinum, sum Kjartan Hoydal skrivaði til limir í Átakinum Hesuferð, skýtur hann upp, at fólk í Hesuferð fara at gera fleiri viðmerkingar í persónligum lesarabrøvum, sum tey eisini gjørdu fram til summarið 2000.

Og hann bjóðar eina hjálpandi hond til tey, sum hava hug at skriva lesarabrøv.

– Eg geri gjarna uppskot til innihald í lesarabrøvum, sum fólk kunnu taka at sær, umskriva og senda bløðunum, skrivar Kjartan Hoydal.

## Bara eitt tilboð

Ljóðar hetta ikki, sum at tit vilja einsrætta viðmerkingar hjá fólki í tykkara felagsskapi?

– Nei, als ikki. Hetta er bara til tilboð um hjálp til fólk, sum hava ilt við at formulera tær hugsanir, sum tey hava.

– Í einum og hvørjum felagsskapi er tað ofta ein minni bólkur, sum er mest aktivur, og eg haldi at, tey, sum duga at skriva, skulu hjálpa hinum, sum hava eitt sindur verri við at orða seg. Tað er hetta, sum liggur í mínum tilboði, sigur Kjartan Hoydal.

## Fólk sjálvi ábyrgd

Kjartan Hoydal skrivar í famøsa teldubrævinum, at Hesuferð hevur brúk fyri talsmonnum og kvinnum, sum kunnu stíga fram og royna at halda sjálvstýrismálið burtur úr tí vaksandi valstríðnum til komandi løgtings- og fólkatingsval.

– Vit ætla á ongan hátt at skriva viðmerkingar fyri fólk, sum tey ikki kunnu standa við. Eg bjóði bara fólki eina hjálp til at formulera seg, og so eru tað tey, sum hava endaliga ábyrgdina av lesarabrævinum og tí, sum stendur í tí, sigur Kjartan Hoydal.

– Eg bjóði eina hjálpandi hond fyri at fáa eitt neyðugt orðaskifti í lag, har eisini fólk kunnu luttaka, sum hava ilt við at formulera sínar hugsanir.

**Fólk til Installatiónsdeildina á Føroya Tele**

"At stúran drepir fleiri fólk enn arbeiði, kemur av, at fleiri fólk stúra enn arbeiða"
Robert Frost



Søkt verður eftur fólki til Installatiónsdeildina á Føroya Tele at byrja skjótast gjørligt.

Fólkið, ið søkt verður eftir, skal í stóran mun arbeiða við installatión (nýgerð og broytingum) av tekniskari útgerð innanhýsis á Føroya Tele. Arbeiðið er so gott sum alt innandura, og arbeitt verður um alt landið.

**Vit kunnu bjóða eitt áhugavert arbeiði við atliti til:**
nýgerð og viðlíkahald av tekniskari útgerð og installatión av
· Abbonenttrinum
· Transmissiónsútgerð
· ISDN
· ADSL
· Veikstreymsveitingum
· Køliskipanum
· Alarmyvirløringum
· annað fyrifallandi

**Útbúgving og førleikar hjá umsøkjarum:**
Elektrikari ella líknandi og/ella hollar viðkomandi royndir. Koyrikort krevst.

Arbeitt verður út frá Føroya Tele í Tórshavn.

Starvsfólk á Føroya Tele skulu kunna arbeiða sjálvstøðugt, vera opin og duga væl at samstarva. Eisini vænta vit EDV-førleika á brúkarastøði.

Starvið er lønt sambært sáttmála millum Arbeiðsgevarafelagið og Starvsmannafelagið.

Gjøllari upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Åge Davidsen, deildarleiðara, tel. 243216 ella Starvsfólkadeildina tel. 303030.

Umsóknir við avriti av møguligum prógvum og ummælum, skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 24. august 2001 og skulu sendast til:

**Føroya Tele**
Att.: Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
110 Tórshavn

Føroya Tele hevur, sum ein týðandi partur í føroyska samfelagnum, ábyrgdina av meginpartinum av fjarskiftisflutninginum í Føroyum. Menningin innan fjarskiftisøkið gongur sera skjótt og hetta setur stór krøv til fyritøku og starvsfólk. Vit søkja tí eftir skikkaðum fólki, sum vilja verða við til at gera tað stuttligt at venda sær til Føroya Tele.

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum!